# ÁRSROKNSKAPUR
# ÅRSREGNSKAB

# 2006

TRYGD

hugsar um teg.

# Innihaldsyvirlit / Indholdsfortegnelse


| | |
|---|---|
| Leiðslufrágreiðing 2006 | 2 |
| Ledelsesberetning 2006 | 4 |
| Nýttur roknskaparháttur | 6 |
| Anvendt regnskabspraksis | 7 |
| Gongdin seinastu 5 árini | 8 |
| Udviklingen over 5 år | |
| Rakstrarúrslit | 9 |
| Resultatopgørelse | |
| Fíggjarstøða pr. 31. desember | 10 |
| Balance pr. 31. december | |
| Viðmerkingar til ársroknskapin | 11 |
| Noter til årsregnskab | |
| Átekningar | 14 |
| Påtegninger | |
| Grannskoðaraátekningar | 15 |
| Revisionspåtegninger | |



P/F TRYGD
Gongin 7
Postboks 44
FO 110 Tórshavn
Tlf. +298 358100
Fax +298 317211
E-mail: trygd@trygd.fo
www.trygd.fo
Pf.skr.nr.8, Tórshavn
V-tal nr. 324.086

**Marknaðurin**
Í 2006 hevur tann føroyski marknaðurin av skaðatryggingum ment seg á fleiri økjum. Marknaðurin hevur lutvíst verið ávirkaður av viðurskiftum sum harðari kapping og rímiligum vøkstri, men eisini av nýskapan og, lutvíst, av framtíðarútlitum uttaneftir sum fylgja av Íslandssáttmálanum um frælsan flutning av kapitali, vørum og tænastum millum londini. Hetta seinasta hevur merkt, at tann íslendska staðfestingin av tryggingarlógini kom í gildi frá og við 1. novembur 2006. Tann mótsvarandi føroyska staðfestingin er enn ávegis og verður væntandi staðfest í 2007 í sambandi við ta nýggju tryggingarlógina. Nýggja føroyska tryggingarlógin fer allarhelst at elva til eina liberalisering og harvið økja um møguleikarnar hjá útlendskum útbjóðarum at koma inn á føroyska tryggingarmarknaðin. Eitt nýtt uppskot til nýggja arbeiðsskaðatryggingarlóg kom út í árinum, men uppskotið er framvegis til viðgerðar, og ein viðtøka eftir næstu hoyring kann væntandi setast í verk í fyrsta lagi frá 1. januar 2008.

Í 2006 byrjaði Trygd at tekna fleiri ymiskar nýggjar tryggingar, har ímillum privatar vanlukkutryggingar. Føroyski marknaðurin innan hetta økið er í sjálvum sær sera lítil og økið hevur ikki hoyrt við í føroysku tryggingarsiðvenjuni. Tað er tó ongin ivi um, at hesar trygginar eru í vøkstri, og tað er av stórum týdningi at bjóða vanlukkutryggingar til privat. Trygd var fyrst á føroyska marknaðinum við viðgerðartryggingum til bæði privata og vinnuliga marknaðin. Viðgerðartrygging fevnir um viðgerð uttan bíðitíð á privatsjúkrahúsum í Norðurlondum. Henda trygging hevur verið væl móttikin á marknaðinum, men er ikki stórur partur av samlaða virkseminum hjá Trygd.

Skaðagongdin á marknaðinum fyri 2006 hevur verið vanlig og hevur ikki verið merkt av størri skaðum. Hvørki innan sjóvá-, vinnu- ella privattrygging. Skaðatalið var á sama støði sum í 2005.

**Tryggingargjøld**
Trygd hevur eisini í 2006 staðfest ein framhaldandi vøkstur í goymslunøgdini av tryggingum. Bruttotryggingargjøldini eru soleiðis økt úr 66,4 mió. kr. í 71,9 mió. kr., sum svarar til eina øking á uml. 8%.

Hesin vøkstur kann partvís grundast á ein áhaldandi vøkstur í tryggingartørvinum, eins og felagið framvegis hevur økt sín marknaðarpart innan flestu tryggingargreinar. Hetta er tó ikki galdandi innan sjóvátryggingar, har marknaðarparturin hjá Trygd helst er minkaður. Hetta er ein beinleiðis avleiðing av príspolitikkinum hjá Trygd, sum ikki hevur tikið lut í eini enn størri lækking av tryggingargjøldunum, sum í teimum undanfarnu árunum hevur ført tap við sær.

**Skaðagongdin**
Í 2006 hevur skaðagongdin verið ávirkað av fleiri sethúsaeldum, fleiri vatnskaðum og skaðum á stuttleikabátar, sum hevur ført við sær høgar endurgjaldsútreiðslur innan privatgreinarnar.
Innan biltryggingarøkið rættaðist neiliga gongdin í skaðaútreiðslunum frá 2005, men talið av skaðum var hægri enn í 2005. Samlaða úrslitið innan biltryggingarøkið fyri alt árið 2006 er sostatt ikki heilt nøktandi enn. Úrslitið av goymslunøgd felagsins av sjóvátryggingum hevur havt eina neiliga gongd í 2006 býtt út á fleiri einkultskaðar. Innan aðrar tryggingar - greinar, undantikið einstakar vinnuligar tryggingargreinar, hevur úrslitið verið nøktandi.

Tær samlaðu skaðaútreiðslurnar fyri egna rokning í 2006 vóru uml. 34 mió. kr. ímóti 36 mió. kr. árið fyri.

**Endurtrygging**
Endurtryggingarskipanin hjá Trygd fyri 2006 broyttist og grundarlagið var, at Trygd skuldi rinda fyri vanligar skaðar fyri egna rokning. Harafturímóti skuldu størri váði og skaðar, eitt nú stormur og katastrofa, framhaldandi verða endurtryggjað. Broytingar í endurtryggingarskipanini og

endurtryggingarsamansetingini, saman við einum lægri prísi, merkti, at endurtryggingarskipanin fyri 2006 varð munandi betrað innan samanseting av tryggingum, inntøkum og skaðagongd. Hetta førdi eisini til, at tryggingar -inntøkurnar fyri egna rokning hækkaðu í 2006, meðan skaðaendurgjøld fyri egna rokning minkaðu í 2006.

**Tryggingartekniskt úrslit**
Trygd hevði í 2006 eitt tryggingartekniskt úrslit á umleið 4.5 mió. kr., eftir at aðrar útreiðslur á 2,1 mió. kr. vóru roknaðar frá. Hetta stavar serstakliga frá broytingum í endurtryggingini, lægri skaðaútreiðslum og umlegging av innanhýsis mannagongdum. Úrslitið kann sigast at vera sera nøktandi og betri enn væntað.

**Gongdin í felagnum**
Trygd legði framvegis í 2006 áherðslu á broytingar og menning, bæði innanhýsis og uttanhýsis.
Felagið legði framhaldandi dentin á sølu og vøkstur í goymslunøgdini av tryggingum.
Hetta hevur havt við sær munandi økt virksemi innan útboð av tryggingum, tænastum og søluhættum til gagns fyri viðskiftafólk felagsins. Eisini hevur felagið broytt bygnaðin við nýggjum leiðsluhátti og nýggjum starvsfólki. Felagið hevur serliga lagt dentin á eina ágrýtna og málsøkjandi leiðara- og starvsfólkamentan, har samstarv hevur stóran týdning. 1. januar 2007 yvirtók Trygd nýggj høli næst at teimum núverandi hølunum á Kongabrúnni, og hølini verða nú umbygd og fríðkað undir einum.
Við árslok 2006 vóru 26 fulltíðarstarvsfólk í felagnum samanborið við 22 fólk í 2005. Harafturat eru eisini ráðgevar í fríari vinnu, sum hava verið tilknýttir felagnum síðani 2006.

**Ársúrslit**
Trygd hevði í 2006 eitt avlop á 7.0 mió. áðrenn skatt.

Hóast innroknaðu høgu útreiðslurnar í sambandi við umbygging og fríðkan av hølum, er leiðslan sera nøgd við úrslit felagsins.

Skatturin er 1.3 mió. kr., og nettoavlopið eftir skatt í 2006 vísir hereftir eitt yvirskot á 5.7 mió. kr.

**Ársavlop**
Nevndin skjýtur upp, at útgoldnar verða 30 mió. kr. í vinningsbýti til partaeigaran, sum merkir, at Trygd útlutar alt ársúrslitið fyri 2006 upp á 5.7 mió. kr., og nýtir 24.3 mió. kr. av fríum reservum at útluta til partaeigaran.

**Eginogn felagsins**
Við árslok 2006 var eginognin 97.4 mió. kr. Partapeningin, sum er 40 mió. kr., eigur P/F Føroya Banki allan.

**Útlit fyri 2007**
Leiðslan væntar sær eina øking í tryggingargjøldunum, partvíst orsakað av veruligum vøkstri í tryggingargjøldunum innan flestu tryggingargreinar, partvíst orsakað av nýggjum tryggingum innan privat- og sjóvátryggingar og av einum størri marknaðarparti.
Ein framhaldandi liberalisering av tryggingarmarknaðinum fer ivaleyst at tilføra hesum nýggjan dynamikk, nakað sum fer at gagna bæði tryggingar-viðskiftafólki og marknaðinum. Felagið fer væntandi at kunna varðveita ein hampuligan javnvág í tekniska úrslitinum, sum eina beinleiðis avleiðing av teimum tiltøkum, sum longu eru framd og av útreiðslufokus felagsins.

## Markedet

Det færøske marked for skadesforsikring har i løbet af 2006 udviklet sig på flere fronter. Dels blev markedet præget af indre faktorer såsom hård konkurrence og moderat vækst, men også nyudvikling og dels kom der nye eksterne perspektiver i form af den indgåede færøsk-islandske aftale om fri bevægelighed af kapital, varer og tjenester mellem landene. Sidstnævnte betød, at den islandske ratificering af lov om forsikring blev gjort gældende fra og med d. 1.november 2006. Den færøske tilsvarende ratificering afventes stadig og forventes vedtaget i løbet af 2007 i forbindelse med den nye forsikringslov. Den nye færøske forsikringslov vil givetvis medføre en liberalisering af de eksisterende rammer for udøvelse af forsikringsvirksomhed på Færøerne, derved at udenlandske aktører vil kunne operere på Færøerne. Der blev i løbet af året udsendt et nyt udkast til ny arbejdsskadelov, men forslaget er endnu til vurdering og en vedtagelse efter endnu en høring kan tidligst ventes sat i kraft pr. 1.januar 2008.

Trygd påbegyndte i 2006 at tegne flere nye produkter herunder privat ulykkesforsikring. Markedet for privat ulykkesforsikring er som udgangspunkt ganske lille på Færøerne, idet der ingen tradition har været for dette produkt. Der er dog ingen tvivl om, at produktet vinder indpas og er et nødvendigt tilbud til privatkunderne. Ligeledes påbegyndte Trygd at tegne landets første sundhedsforsikringer i form af behandlingsforsikring til såvel private som erhvervslivet. Behandlingsforsikringen dækker behandling på privathospitaler i Norden og uden ventetid. Produktet blev vel modtaget i markedet men udgør ikke et større forretningsgrundlag.

Generelt for hele markedet har 2006 været præget af et normalt skadesforløb uden helt store enkeltstående skader indenfor søforsikring, erhverv og privat. Skadesfrekvensen er således stort set på niveau med 2005.

## Præmieindtægter

I 2006 kunne Trygd mønstre en fortsat vækst i forsikringsporteføljen. Bruttopræmien er steget fra 66,4 mio.kr. til 71,9 mio. kr. svarende til en stigning på godt 8 %.

Væksten kan dels begrundes i en fortsat vækst i forsikringsbehovet, ligesom selskabet fortsat har vundet en større markedsandel indenfor de fleste brancher. Det gælder dog ikke søforsikring, hvor Trygd formentlig har reduceret sin markedsandel. Dette som en direkte konsekvens af Trygd´s prispolitik, idet Trygd ikke deltog i en yderligere sænkning af præmieniveauet, der i de forløbne år har været tabsgivende for markedet.

## Skadesforløbet

For Trygd har skadesforløbet i 2006 været præget af flere privathus-brande, mange vandskader samt mange skader på lystfartøjer, hvilket har betydet høje skadeserstatningsudgifter i privatbrancherne. Inden for bilforsikringsområdet rettedes den negative udvikling i skadesudgifterne fra 2005, men skadesfrekvensen var hér højere end i 2005. Det samlede resultat på bilområdet for hele året 2006 blev således endnu ikke helt tilfredsstillende. Resultatet for Trygd’s portefølje af søforsikringer har haft et negativt forløb i 2006 fordelt på flere enkeltskader. Trygd´s øvrige portefølje, bortset fra enkelte erhvervsbrancher, er stort set forløbet tilfredsstillende.

De samlede skadesudgifter for egen regning i 2006 var ca. 34 mio. kr. mod ca. 36 mio. kr. året før.

## Reassurance

Trygd´s reassuranceprogram for 2006 blev ændret og grundlaget var, at Trygd skulle dække almindeligt forekommende skader for egen regning, hvorimod større risici og skader, herunder storm og katastrofe, fortsat skulle være reassureret. Ændringer af programmet og reassurance-principper samt en lavere pris, betød at Trygd’s reassuranceprogram for 2006 var væsentlig mere effektivt og optimerende ud fra

selskabets porteføljestruktur, præmieindtægter og skadesforløb. Trygd´s præmieindtægter for egen regning steg af denne årsag i 2006, ligesom skadeserstatninger for egen regning reduceredes i 2006.

**Forsikringsteknisk resultat**
Trygd fik i 2006 et forsikringsteknisk resultat på ca. 4,5 mio. kr., efter afholdelse af ekstraordinære omkostninger i størrelsesordenen 2,1 mio. kr., hvilket primært skyldtes omlægningen af reassurancen, lavere skadesudgifter samt en effektivisering af selskabets interne forretningsgange. Resultatet må betragtes som ganske tilfredsstillende og bedre end forventet.

**Selskabets udvikling**
Trygd havde fortsat i 2006 fuld fokus på forandring og nyudvikling, såvel internt som eksternt. Selskabets fokus var således fortsat lagt på salg og vækst i porteføljen. Dette har bl.a. betydet væsentlig forøgede kunderelaterede aktiviteter i form af nye services, produkter og distributionskanaler til gavn for vore kunder. Selskabet har herudover gennemført en væsentlig organisationsforandring med indførelse af en ny ledelsesstruktur og nye medarbejdere. Selskabet har især fokuseret på en proaktiv og målsøgende leder- og medarbejderkultur med samarbejdet i centrum. Selskabet overtog d. 1.januar 2007 nye lokaler i forlængelse af den eksisterende bygning på Kongebroen, og et større moderniseringsarbejde af den samlede bygning er nu iværksat.
Ved udgangen af 2006 var der 26 fuldtidsansatte medarbejdere i selskabet, mod 22 i 2005.
Hertil skal lægges et antal free-lance konsulenter, som har været tilknyttet selskabet i 2006.

**Årets resultat**
Trygd havde i 2006 et overskud på 7,0 mio. kr. før skat.

Med baggrund i det positive resultat, trods de indkalkulerede høje omkostninger i forbindelse med modernisering/ombygning, anser ledelsen resultatet for meget tilfredsstillende.

Skatten andrager 1,3 mio. kr., og nettoresultatet efter skat i 2006 udviser herefter et overskud på 5,7 mio. kr.

**Overskudsdisponering**
Bestyrelsen foreslår, at der udbetales 30,0 mio. kr. i udbytte til aktionæren, som betyder, at Trygd udlodder årets overskud på 5,7 mio. kr. samt anvender 24,3 mio. kr. fra frie reserver.

**Selskabets kapitalforhold**
Ved udgangen af 2006 androg Trygd's egenkapital således 97,4 mio. kr. Aktiekapitalen, der andrager 40 mio. kr., ejes i sin helhed af P/F Føroya Banki.

**Forventninger til 2007**
Ledelsen forventer, at selskabet vil se en øget præmieudvikling dels baseret på realvækst i præmieniveauer inden for de fleste brancher samt nye produkter inden for privat og sø, samt dels baseret på øget markedsandel.

En fortsat liberalisering af forsikringsmarkedet vil givetvis bibringe dette ny dynamik, hvilket vil komme såvel kunderne som branchen til gode. Selskabet forventer at kunne fastholde en rimelig balance i det tekniske resultat direkte afledt af de iværksatte initiativer og fokus på omkostninger.

**Alment**
Ársroknskapurin hjá TRYGD er gjørdur í samsvari við lóg um tryggingarvirksemi og í samsvari við alment góðkendar roknskaparreglur.
Nýttur roknskaparháttur er óbroyttur í mun til undanfarna ár.

**Tryggingargjøld**
Tryggingargjøld verða tíðaravmarkað, soleiðis at inntøkur verða tiknar við í tann mun, tær er tengdar at roknskaparárinum.

**Latin endurtryggingargjøld**
Tryggingargjøld til endurtryggingarfeløg verða tíðaravmarkað, soleiðis at útreiðslur verða tiknar við í tann mun, tær eru tengdar at roknskaparárinum.

**Endurgjøld/endurgjaldsburturleggingar**
Endurgjaldsburturleggingar og áogn av skaðum, eru uppgjørd eftir einsæris metingum av hvørjum skaða sær, sum ikki er endaliga uppgjørdur. Íroknað endurgjaldsburturleggingar, er eisini ein eykaupphædd á 5% fyri hendar men ikki fráboðaðar skaðar, og eitt eyka fríhald á 10% til óvæntaðar skaðaútreiðslur.

**Tryggingarteknisk renta**
Tryggingartekniska rentan er roknað sum 3,48% av miðalstøddini á tryggingarburturleggingum fyri egna rokning.

**Endurtryggingarfulnaður**
Gjøld frá endurtryggjaranum viðvíkjandi meldaðum skaðum verða tíðaravmarkað, soleiðis at hesi verða tikin við í tann mun, tey eru tengd at roknskaparárinum.

**Fastar ognir**
P/F TRYGD eigur eini tvíhús, hvørs virði er ásett til marknarvirði.

**Lánsbrøv**
Lánsbrævagoymsla felagsins er virðissett sambært almennum kursum við árslok.

**Innbúgv og rakstrartól**
Innbúgv og rakstrartól felagsins eru bókað til keypsprís, frádrigið av- og niðurskrivingar. Ognirnar verða avskrivaðar liniert, grundað á ætlaða nýtslutíð eftir 3 til 5 ár.
Útveganir av rakstrargøgnum fyri undir 20 tkr. verða útreiðsluførdar.
Ritbúnaður (software) verður útreiðsluførdur í útveganarárinum.

**Skattur**
Skattur er samansettur av skatti av skattskyldugu inntøkuni fyri árið og javning av útsettum skatti. Skatturin av skattskyldugu inntøkuni í árinum verður útreiðsluførdur í rakstrarúrslitinum við 18%.
Útsetti skatturin verður avsettur við 18% av muninum millum roknskaparlig og skattlig virði á ogn og skuld.

**Handlar innan samtakið**
Við handli millum feløg í samtakinum og millum samstarvsfyritøkur, eins og tá hesi gera arbeiðið hvørt fyri annað, verða avroknað sambært marknaðartreytum ella á einum útreiðslunøktandi grundarlagi.

**Generelt**
Årsregnskabet er udarbejdet i overensstemmelse med lov om forsikringsvirksomhed, samt almindelig anerkendt regnskabspraksis.

Anvendt regnskabspraksis er uændret i forhold til sidste år.

**Præmier/præmiehensættelser**
Præmieindtægten periodiseres, således at indtægten svarer til regnskabsåret andel.

**Afgivne genforsikringspræmier**
Præmier til reassurandører periodiseres, således at udgiften svarer til regnskabsårets andel.

**Erstatninger/erstatningshensættelser**
Erstatningshensættelser og tilgodehavender vedrørende skader opgøres efter en individuel vurdering af hver uafsluttet skade. I erstatningshensættelserne indgår endvidere en reserve på 5% til indtrufne men ikki anmeldte skader og en ekstra stødpudereserve på 10% til forudsete skadeudgifter.

**Forsikringsteknisk rente**
Den forsikringstekniske rente bregnes som 3,48% af de gennemsnitlige forsikringsmæssige hensættelser for egen regning.

**Genforsikringsdækning**
Reassurandørens andel af anmeldte skader periodiseres, således at indtægten svarer til regnskabsårets andel.

**Bygninger**
TRYGD ejer 1 sammenbygget rækkehus, hvis værdi er ansat til markedsværdi.

**Værdipapirer**
Selskabets obligationsbeholdning er optaget til den senest noterede officielle kurs.

**Inventar, edb anlæg, bil m.v.**
Inventar, edb anlæg og selskabets biler er opført til anskaffelsessum, reguleret for af- og nedskrivninger. Der foretages liniære afskrivninger baseret på aktivernes forventede driftsøkonomiske levetid på mellem 3 og 5 år.
Anskaffelse af driftsmateriel under 20 tkr. udgiftsføres.
Software udgiftsføres i anskaffelsesåret.

**Skat**
Årets skatteudgift omfatter skat af årets skattepligtige indkomst samt regulering af udskudt skat.
Skat af årets skattepligtige indkomst udgiftsføres i resultatopgørelse med 18%.
Udskudt skat hensættes efter den balanceorienterede gældsmetode med 18% af midlertidige forskelle mellem regnskabs- og skattemæssige værdier af aktiver og passiver.

**Koncerninterne transaktioner**
Transaktioner mellem koncernes selskaber og associerede virksomheder afregnes på markedsbaserede vilkår eller på omkostningsdækkende basis.

**Høvuðstøl / Hovedtal**

| **DKK 1.000** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **2006** |
|---|---|---|---|---|---|
| Tryggingargjøld f.e.r / Præmieindtægter f.e.r. | 13.982 | 34.508 | 41.576 | 49.720 | 57.870 |
| Skaðagjøld f.e.r / Erstatningsudgifter f.e.r. | -8.853 | -26.254 | -28.601 | -35.823 | -33.654 |
| Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r. / Forsikringsmæssige driftsomkostninger f.e.r. | -6.187 | -9.475 | -12.127 | -15.813 | -21.030 |
| Tryggingartekniskt úrslit / Forsikringsteknisk resultat | -665 | -652 | 1.449 | -1.145 | 4.532 |
| Úrslit av íløguvirksemi / Resultat af invest. virksomhed | 4.468 | 3.013 | 3.158 | 3.306 | 2.435 |
| Ársúrslit / Årets resultat | 3.059 | 1.889 | 3.694 | 1.720 | 5.706 |
| Forsikringsmæssige hensættelser f.e.r. | 14.470 | 21.811 | 24.847 | 36.858 | 39.485 |
| Eginpeningur / Egenkapital | 114.416 | 116.305 | 119.999 | 121.719 | 97.425 |
| Ognir tilsamans / Aktiver i alt | 132.552 | 148.266 | 157.017 | 173.551 | 183.080 |

| | DKK 1.000 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| | Tryggingargjøld, brutto / Bruttopræmier | 71.941 | 66.406 |
| | Latin endurtryggingargjøld / Afgivne genforsikringspræmier | -11.376 | -14.909 |
| | Broyting í avsetingum til tryggingargjøld / Ændring i bruttopræmiehensættelser | -2.662 | -1.818 |
| | Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til tryggingargjøld / Ændring i genforsikringsandel af præmiehensættelser | -33 | 41 |
| | **Tryggingargjøld f.e.r. / Præmieindtægter f.e.r.** | **57.870** | **49.720** |
| 1 | **Tryggingarteknisk renta f.e.r. / Forsikringsteknisk rente f.e.r.** | **1.346** | **771** |
| | Útgoldin skaðagjøld, brutto / Udbetalte bruttoerstatninger | -38.695 | -29.110 |
| | Endurgoldið frá endurtryggingingini / Modtaget genforsikringsdækning | 4.973 | 3.521 |
| | Broyting í avsetingum til skaðagjøld / Ændring i bruttoerstatningshensættelser | 1.007 | -10.493 |
| | Broyting í endurtryggingarparti av avsetingum til skaðagjøld / Ændring i genforsikringsandel af erstatningshensættelser | -939 | 259 |
| | **Skaðagjøld f.e.r. / Erstatningsudgifter f.e.r.** | **-33.654** | **-35.823** |
| 2,6,7 | Fyrisitingarútreiðslur / Administrationsomkostninger | -22.137 | -15.562 |
| | Tekningarútreiðslur / Erhvervelsesomkostninger | -539 | -744 |
| | Provisiónir frá endurtryggingum / Provisioner fra genforsikringsselskaber | 1.646 | 493 |
| | **Rakstrarútreiðslur av trygging f.e.r / Forsikringsmæssige driftsomkostninger f.e.r.** | **-21.030** | **-15.813** |
| | **Tryggingartekniskt úrslit / Forsikringsteknisk resultat** | **4.532** | **-1.145** |
| | Inntøkur av fastari ogn / Indtægter af fast ejendom | -43 | -16 |
| 3 | Rentur og vinningsbýti v.m. / Renter og udbytter m.v. | 4.708 | 4.137 |
| 4 | Virðisjavnan av íløguognum / Kursreguleringer af investeringsaktiver | -884 | -44 |
| | **Inntøkur av íløguognum / Indtægter af investeringsaktiver** | **3.781** | **4.077** |
| | **Flutt til tryggingartekniska rentu / Overført til forsikringsteknisk rente** | **-1.346** | **-771** |
| | **Úrslit av íløguvirksemi / Resultat af investeringsvirksomhed** | **2.435** | **3.306** |
| | **Úrslit undan skatti / Ordinært resultat før skat** | **6.967** | **2.161** |
| 5 | **Skattir / Skatter** | **-1.261** | **-441** |
| | **Ársúrslit / Årets resultat** | **5.706** | **1.720** |
| | **Býti av rakstrarúrsliti / Fordeling af resultat** | **5.706** | **1.720** |
| | **Flutt frá undanfarnum árum / Overført fra tidligere år** | **36.744** | **35.024** |
| | **Tøkar / Til disposition** | **42.450** | **36.744** |
| | **Nýtt til vinningsbýti / Anvendt til udbytte** | **30.000** | **0** |
| | **Framflutt úrslit / Overført resultat** | **12.450** | **36.744** |
| | **Tilsamans / I alt** | **12.450** | **36.744** |

# Fíggjarstøða 31. desember / Balance pr. 31. december

| | DKK 1.000 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| | **Ogn / Aktiver** | | |
| 8 | Fastar ognir / Faste ejendomme | 980 | 980 |
| 10 | Lánsbrøv / Obligationer | 52.163 | 36.478 |
| | **Íløguognir / Investeringsaktiver** | **53.143** | **37.458** |
| 11 | Áogn hjá tryggingartakarum / Tilgodehavende hos forsikringstagere | 11.546 | 9.472 |
| 12 | Áogn hjá tryggingarfeløgum / Tilgodehavende hos forsikringsselskaber | 1.291 | 63 |
| 13 | Onnur áogn / Andre tilgodehavender | 49 | 49 |
| | **Áogn / Tilgodehavende** | **12.886** | **9.584** |
| 9 | Edv, innbúgv, bilar o.a. / Edb, inventar, biler m.v. | 556 | 353 |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn / Kassebeholdning og anfordringstilgodehavender | 113.147 | 124.256 |
| | **Aðrar ognir / Andre aktiver** | **113.703** | **124.609** |
| | **Tíðaravmarkingar / Periodeafgrænsningsposter** | **3.348** | **1.900** |
| | **Ognir tilsamans / Aktiver i alt** | **183.080** | **173.551** |
| | **Skuld / Passiver** | | |
| | Partapeningur / Aktiekapital | 40.000 | 40.000 |
| | Yvirkursgrunnur / Overkursfond | 44.975 | 44.975 |
| | Framflutt úrslit / Overført resultat | 12.450 | 36.744 |
| 14 | **Eginpeningur / Egenkapital** | **97.425** | **121.719** |
| | Avsett til tryggingargjøld, brutto / Bruttopræmiehensættelser | 17.178 | 14.516 |
| | Partur hjá endurtryggingini / Genforsikringsandel | -195 | -228 |
| 15 | **Avsett til tryggingargjøld f.e.r. / Præmiehensættelser f.e.r.** | **16.983** | **14.288** |
| | Avsett til skaðagjøld, brutto / Erstatningshensættelser, brutto | 23.927 | 24.935 |
| | Partur hjá endurtryggingini / Genforsikringsandel | -1.425 | -2.365 |
| | **Avsett til skaðagjøld f.e.r. / Erstatningshensættelser f.e.r.** | **22.502** | **22.570** |
| | **Aðrar avsetingar / Andre hensættelser** | **0** | **0** |
| 16 | Skuld í samband við endurtrygging / Gæld i forbindelse med genforsikring | 421 | 2.267 |
| | Partafelagsskattur / Selskabsskat | 1.261 | 439 |
| | Onnur skuld / Anden gæld | 4.433 | 3.169 |
| | Vinningsbýti fyri roknskaparárið / Udbytte for regnskabsåret | 30.000 | 0 |
| | **Skuld / Gæld** | **36.115** | **5.875** |
| 17 | **Tíðaravmarkingar / Periodeafgrænsningsposter** | **10.055** | **9.099** |
| | **Skuld tilsamans / Passiver i alt** | **183.080** | **173.551** |

| | DKK 1.000 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| 1 | **Tryggingarteknisk renta / Forsikringsteknisk rente** | | |
| | Tryggingarteknisk renta er roknað sum 3,48% av miðal burturleggingum fyri tryggingarvirksemi f.e.r. / Forsikringsteknisk rente er beregnet som 3,48 % af de gennemsnitlige forsikringsmæssige hensættelser f.e.r. | | |
| 2 | **Fyrisitingarútreiðslur / Administrationsomkostninger** | | |
| | Í upphæddini eru íroknaðar hesar avskrivingar / I beløbet indgår følgende afskrivninger: | | |
| | Maskinur og innbúgv / Maskiner og inventar | 123 | 90 |
| | Bilar / Biler | 222 | 91 |
| | Fastogn / Fast ejendom | 0 | 0 |
| | Tilsamans / I alt | 345 | 181 |
| 3 | **Rentur og vinningsbýti / Renter og udbytte m.v.** | | |
| | Renta av lánsbrøvum / Renter af værdipapirer | 2.179 | 1.433 |
| | Renta av innlánum / Renter af indlån | 2.529 | 2.705 |
| | Renta av íløgugrunni / Rente af investeringsfond | 0 | 0 |
| | Vinningsbýti av partabrøvum / Udbytte af aktier | 0 | 0 |
| | Tilsamans / I alt | 4.708 | 4.137 |
| 4 | **Virðisjavnan av íløguognum / Kursreguleringer af investeringsaktiver** | | |
| | Virðisjavnan av íløguognum / Kursreguleringer af investeringsaktiver | -884 | -44 |
| | Tilsamans / I alt | -884 | -44 |
| 5 | **Skattur / Skat** | | |
| | Skattur av skattskyldugari inntøku / Skat af skattepligtig indkomst | 1.262 | 439 |
| | Javnan av útsettum skatti viðvíkjandi ársúrslitinum / Regulering af udskudt skat vedrørende årets resultat | -1 | 2 |
| | Tilsamans / I alt | 1.261 | 441 |
| 6 | **Leiðslu- og starvsfólkaviðurskifti / Ledelses- og medarbejderforhold** | | |
| | Umroknað til fulla tíð hava í miðal starvast 27 fólk í felagnum í roknskaparárinum / Omregnet til fuldtidsansatte har der i gennemsnit i regnskabsåret været ansat 27 personer | | |
| | Útreiðslurnar til lønir, eftirlønir o.a. kunnu sundurgreinast soleiðis / Den samlede udgift til lønninger, pensioner m.v. udgør til: | | |
| | Nevnd / Bestyrelse | 84 | 99 |
| | Stjórn / Direktion | 1.445 | 1.077 |
| | Fyri onnur starvsfólk er upphæddin / For øvrige medarbejdere udgør beløbet: | | |
| | Lønir / Lønninger | 8.815 | 6.620 |
| | Eftirlønir / Pensioner | 715 | 525 |
| | Sosialar útreiðslur / Social sikring | 761 | 482 |
| 7 | **Gjald til grannskoðarar / Revisionshonorar** | | |
| | Gjald til lógásetta grannskoðan / Honorar for lovpligtig revision | 164 | 160 |
| | Aðrar veitingar / Andre ydelser | 24 | 0 |

| | DKK 1.000 | 2006 | 2005 |
|---|---|---|---|
| 8 | **Fastar ognir / Faste ejendomme** | | |
| | Útveganarvirði / Anskaffelsespris | 980 | 1.960 |
| | Tilgongd / Tilgang | 0 | 0 |
| | Frágongd / Afgang | 0 | 980 |
| | Avskriving undanfarin ár / Tidligere års afskrivning | 0 | 0 |
| | Avskrivingar í árinum /Årets afskrivning | 0 | 0 |
| | Bókað virði 31.12 / Bogført værdi 31.12 | 980 | 980 |
| 9 | **Edv, innbúgv og bilar o.a. / Edb, inventar og biler m.v.** | | |
| | Útveganarvirði / Anskaffelsespris | 1.571 | 1.370 |
| | Tilgongd / Tilgang | 712 | 201 |
| | Frágongd / Afgang | 164 | 0 |
| | | 2.119 | 1.571 |
| | Avskriving undanfarin ár / Tidligere års afskrivning | 1.218 | 1.037 |
| | Avskrivingar í árinum / Årets afskrivning | 345 | 181 |
| | | 1.563 | 1.218 |
| | Bókað virði 31.12 / Bogført værdi 31.12 | 556 | 353 |
| | Harumframt er avskrivað beinleiðis í rakstri / Årets straksafskrivninger | 2.525 | 1.451 |
| 10 | **Lánsbrøv / Obligationer** | | |
| | Kursvirði við ársbyrjan / Kursværdi primo | 36.478 | 37.353 |
| | Kursvirði við árs enda / Kursværdi ultimo | 52.163 | 36.478 |
| 11 | **Áogn hjá tryggingartakarum / Tilgodehavender hos forsikringstagere** | | |
| | Eftirstøður / Præmierestancer | 2.765 | 1.845 |
| | Frammanundan uppkravt / Forudfaktoreret | 8.780 | 7.627 |
| | Tilsamans / I alt | 11.545 | 9.472 |
| 12 | **Áogn hjá tryggingarfeløgum / Tilgodehavender hos forsikringsselskaber** | | |
| | Endurtryggingarpartur av skaðagjøldum / Genforsikringens andel af udbetalte erstatninger | 1.291 | 63 |
| | Endurtryggingarprovisión tilgóðar / Tilgodehavende genforsikringsprovision | 0 | 0 |
| | Tilsamans / I alt | 1.291 | 63 |
| 13 | **Onnur áogn / andre tilgodehavender** | | |
| | Postverk Føroya / Postverk Føroya | 7 | 7 |
| | Skattaogn (støðisogn) / Skatteaktiver (anlægsaktiver) | 42 | 42 |
| | Tilsamans / I alt | 49 | 49 |

14 **Eginpeningur / Egenkapital**

| | Parta peningur/ Aktiekapital | Yvirkurs grunnur/ Overk.fond | Fluttur vinningur / Overført resultat |
|---|---|---|---|
| Ársbyrjan 2005 / Primo 2005 | 40.000 | | |
| Yvirkursgrunnur 2005 / Overkursfond 2005 | | 44.975 | |
| Tiltaksgrunnur / Reservefonde | | | 25.000 |
| Ársúrslit / Årets resultat | | | 5.706 |
| Fluttur vinningur / Overførte resultater | | | 11.744 |
| Vinningsbýti / Udbytte | | | -30.000 |
| Árslok 2006 / Ultimo 2006 | 40.000 | 44.975 | 12.450 |

Eginpeningurin er grundkapitalurin í felagnum.
Solvensmarginin, ið er lógarinnar minstakrav til grundkapitalin, er við árs enda tkr. 11.563
Grundkapitalurin er 842 % av solvensmargin /
Egenkapitalen er selskabets basiskapital.
Selskabets solvensmargin, der er lovgivningens minimumskrav til basiskapitalen, udgør ved regnskabsårets afslutning tkr. 11.563
Basiskapitalen udgør 842 % af solvensmargin.

15 **Avsett til tryggingarvirksemi f.e.r. / Forsikringsmæssige hensættelser f.e.r.**
Tryggingar felagsins, tó tryggingar hjá størri skipum undantikið, hava leypandi høvuðsforfall, sum inniber, at tær einstøku tryggingarnar hvør einsæris hava gjaldingardag tann 1. í mánaðinum. Tryggingargjaldið verður antin goldið kvartárliga, hálvárliga ella árliga. Tryggingarnar hjá størri skipum hava allar høvuðsforfall tann 1. januar, og tryggingargjaldið fyri hesar verður goldið kvartárliga. Inntøkan er samsvarandi tíðaravmarkað./
Selskabets forsikringer, bortset fra forsikringer for større skibe, har løbende hovedforfald, hvilket indebærer, at de enkelte forsikringer vil have betalingsdato individuelt den 1. i en måned. Præmien betales enten kvartalsvis, halvårsvis eller helårligt.  Selskabets forsikringsportefølje for større skibe har hovedforfald til 1. januar, og præmien for disse forsikringer betales kvartalsvis. Præmieindtægten er periodiseret tilsvarende.

| | | **2006** | **2005** |
|---|---|---|---|
| 16 | **Skuld í samband við endurtrygging / Gæld i forbindelse med genforsikring** | | |
| | Upphæddin er millumrokning við endurtryggingarfeløg / Beløbet udgør mellemværender med genforsikringsselskaber. | 421 | 2.267 |

17 **Tíðaravmarkingar / Periodeafgrænsningsposter**
Í upphæddini eru goldin ikki fallin tryggingargjøld /
Beløbet omfatter betalte endnu ikke forfaldne præmier

## Átekningar / Påtegninger

Ársroknskapurin verður lagdur fyri aðalfundin við tilmæli um góðkenning /
*Årsregnskabet indstilles til generalforsamlingens godkendelse.*

Tórshavn, tann 15. februar 2007 / Tórshavn, den 15. februar 2007

**Stjórnin / Direktionen**

Ali Celebi

**Nevndin / Bestyrelsen**

| | |
|---|---|
| Janus Petersen<br>Formaður / *Formand* | Súni Schwartz Jacobsen |

| | | |
|---|---|---|
| Christian Andreasen | Niels Juul Andersen | Tummas Hanus Dam |

Hesin roknskapur er soleiðis samtyktur á ársaðalfundi í P/F TRYGD tann 15. februar 2007
*Dette regnskab er således godkendt på generalforsamlingen i P/F TRYGD den 15. februar 2007*

Fundarstjóri / Dirigent
Christian Andreasen

Ársroknskapurin fyri 2006 fyri P/F TRYGD er grannskoðaður av innanhýsis grannskoðanini í P/F FØROYA BANKA.

*Årsregnskabet for 2006 for P/F TRYGD er revideret af den interne revision i P/F FØROYA BANKA.*

Tórshavn, tann 15. februar 2007 / *Tórshavn , den 15. februar 2007*

Petur A. Johannesen

Grannskoðanarleiðari / *Revisionschef*

Vit hava grannskoðað tann av leiðsluni gjørda ársroknskap fyri 2006 fyri P/F TRYGD.

**Framda grannskoðanin**

Vit hava fyrireikað og framt grannskoðanina í samsvari við vanliga góðkendar grannskoðanarreglur við atliti til at fáa eina grundaða sannføring um, at ársroknskapurin ikki inniheldur týðandi feilir ella manglar. Út frá eini meting um týdning og vanda hava vit undir grannskoðanini eftirkannað grundarlagið og skjalaprógvið undir teimum í roknskapinum uppsettu upphæddum og upplýsingum annars. Í hesi hava vit tikið støðu til nýttu roknskaparreglurnar og roknskaparligu metingarnar og hava mett, um upplýsingarnar í ársrokniskapinum sum heild eru nøktandi. Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**

Okkara fatan er, at ársroknskapurin er greiddur úr hondum í samsvari við krøvini í lóggávuni um roknskaparframløgu, og at ársroknskapurin hevur eina rættvísandi mynd av ogn, eginpeningi, burturleggingum og skuld felagsins, tí fíggjarligu støðuni og úrslitinum.

Vi har revideret det af ledelsen aflagde årsregnskab for 2006 for P/F TRYGD.

**Den Udførte revision**

Vi har tilrettelagt og udført revisionen i overensstemmelse med almindeligt anerkendte revisionsprincipper med henblik på at opnå en begrundet overbevisining om, at årsregnskabet er uden væsentlige fejl eller mangler. Under revisionen har vi ud fra en vurdering af væsentlighed og risiko efterprøvet grundlaget og dokumentationen for de i årsregnskabet anførte beløb og øvrige oplysninger. Vi har herunder taget stilling til den anvendte regnskabspraksis og de regnskabsmæssige skøn samt vurderet, om årsregnskabets informationer som helhed er fyldestgørende. Revisionen har ikke givet anledning til forbehold.

**Konklusion**

Det er vor opfattelse, at årsregnskabet er aflagt i overensstemmelse med lovgivningens krav til regnskabsaflæggelsen, og at det giver et retvisende billede af selskabets aktiver og passiver, økonomiske stilling samt resultat.

Tórshavn, tann 15. februar 2007 / *Tórshavn, den 15. februar 2007*

**SPEKT**

Statsaut. Revisorar Sp/f /
*Statsaut. Revisorer Sp/f*

**Rasmussen & Weihe, P/F**

Statsautoriserað grannskoðarafelag

Finnbjørn Zachariasen
statsaut. revisor /
*statsautoriseret revisor*

Jákupa Mikkelsen
cand. merc. aud.

Klaus Rasmussen
statsaut. revisor /
*statsautoriseret revisor*

Ole Guldborg Nielsen
cand. merc. aud.